## Aker letur aftur

Aker Seafood hevur gjørt av at steingja fiskavirkið, sum felagið hevur í norðurnorska býnum Melbu. Aker fekk herfyri fleiri átalur frá Matvørueftirlitinum, tí at viðurskiftini á virkinum í Melbu vóru ikki nøktandi, og tað eru hesar atfinningarnar, sum hava fingið felagið at lata virkið aftur, skrivar Nordlys. Tað er serliga móttøkan, sum stendur fyri skotum, og Aker hevur lovað at bøta um viðurskiftini har. Tá alt er gjørt, letur virkið uppaftur.



*Atfinningar frá Matvørueftirlitinum fingu Aker at lata virkið í Melbu aftur*

*(Mynd: Nordlys)*

# Dekkararnir á Carlton gerast bara treiskari



*- Vit, sum eru í landi, standa saman, og saman við okkum stendur Fiskimannafelag. Vit eru ikki boygnaðir í knøunum, sum dagarnir eru gingnir, men heldur eru knøini vorðin stívari, siga dekkarar við Carlton*

*Mynd: Skipalistin*

**- Vit eru nú meira sannførdir enn nakrantíð um, at vit hava sáttmálan og rættin á okkara síðu og øll, vit møta á gøtuni – heilt frá tí lægsta til hin hægsta - heita dagliga á okkum um at standa fast við, at sáttmálin skal haldast, siga dekkarar á Carlton, sum Sosialurin hevur tosað við í morgun**

CARLTON-MÁLIÐ
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í gjárkvøldið bar útvarpið hjá Kringvarpinum tey tíðindi, at Hanus Hansen, reiðari hjá umstrídda pelagiska skipinum Carlton, ætlar sær á fund við Altjóða Flutningsfelagsskapin, ITF.

Hanus er í hesum døgum í London í páskafrí og hevur boðið sær at hava fund við ITF um Carlton-málið.

Sambært útvarpinum hevur ITF sett sær fyri at royna at loysa trætuna millum Føroya Fiskimannafelag og reiðaríið hjá Carlton.

Reiðarin sigur seg vera bjartskygdan og ynskir eina loysn í málinum.

Sambært útvarpinum sigur stjórin fyri sjóvinnuvirkseminum hjá ITF, Fabrizio Barcelona, at felagið helst ikki vil seta altjóða bann móti Carlton, og í viðmerking sigur formaðurin í Føroya Fiskimannafelag, Jan Højgaard, at altjóða bann helst ikki er besta loysnin. Í aðrar mótir hóttir Jan við at siga limaskapin hjá FF í ITF upp, um altjóða bann vísir seg at vera einasti møguleikin til loysn av málinum, og felagsskapurin kortini ikki vil seta hetta í verk.

### Meira sannførdir

Teir fimm dekkararnir, sum framvegis ganga heima og bíða eftir eini loysn, hava einki hoyrt frá reiðarínum seinastu 2-3 vikurnar.

- Vit vita einki meira enn tað, sum fjølmiðlarnir siga okkum.

Sambært dekkarunum er støðan nú meira fastløst enn nakrantíð – ikki minst eftir, at reiðarin hevur dittað sær at taka málið upp við ITF.

- Vit eru nú meira sannførdir enn nakrantíð um, at vit hava sáttmálan og rættin á okkara síðu og øll, vit møta á gøtuni – heilt frá tí lægsta til hin hægsta - heita dagliga á okkum um at standa fast við, at sáttmálin verður hildin. Hvørki meira ella minni.

*Men eru tit, sum manning í hesi truplu støðu, ikki sinnaðir til at finna eina millumloysn?*

- Jú, tað hava vit verið, og tað er júst hetta, vit hava lagt upp til nú í meira enn eitt heilt ár. Vit hava sagt okkum vilja slaka í prosentum, um hetta geldir alla manningina, eisini yvirmenninar. Men tað einasta, sum er hent í hesi tíðini, er, at yvirmenninir hava fingið ein uppaftur størri part av »køkuni«. Tað eru ikki bara prosentini, ið telja, men so sanniliga eisini partarnir. Vit kundu saktans farið niður í býtisprosentinum, um vit eins og yvirmenninir fingu meira enn tann eina partin. Men tað fáa vit ikki. Úrslitið er, at meðan yvirmenninir nú fáa ein størri part av hýruni, enn teir fingu áður, hava vit við lækkingini úr 27% niður í 23,24% fingið ein minni part.

### Vorðnir treiskari

Dekkarar, sum Sosialurin hevur tosað við í morgun, halda, at soleiðis sum reiðarin hevur viðfarið málið – ikki minst í seinastuni - er eingin orsøk til at slaka í býtisprosentinum, sum er í sáttmálanum.

- Men tað er ikki bara sáttmálin um býtisprosent, sum ikki verður hildin av reiðaranum. Vit hava verið seks túrar higartil í ár, men enn eru vit framvegis bara avroknaðir fyri tveir av hesum, og vit hava bíðað eftir øðrum avrokningum longri, enn sáttmálin loyvir.

Sum skilst á monnum, er teir vorðnir treiskari, sum seinastu dagarnir eru gingnir.

- Vit, sum eru í landi, standa saman, og saman við okkum stendur Føroya Fiskimannafelag. Vit eru ikki boygnaðir í knøunum, sum dagarnir eru gingnir, men heldur eru knøini vorðin stívari, siga teir í morgun.

# Fyrsti dekkarin fer av landinum í dag

**- Eingin av okkum fer at siga upp, men vit kunnu ikki ganga heima og mala og einki gera, siga dekkarar, sum bíða eftir Carltonmálinum**

CARLTON-MÁLIÐ
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Um mánaðarskiftið mars/apríl hava teir fimm dekkararnir, sum eru raktir av mynstringarbanninum hjá Føroya Fiskimannafelag mótvegis pelagiska skipinum Carlton, gingið heima tað mest av einum mánaða.

- Vit kunnu ikki bara ganga heima og mala, men vit fara ikki at siga okkum úr starvi hjá reiðarínum, sum eigur og rekur Carlton. Onkur hevur verið onkran útróðrartúr, onkur hevur smíðað, og onkur hevur landað á Toftum. Í dag fer so tann eini av okkum av landinum og fer við einum útlendskum svartkalva og kongafiskaskipi. Hesin mynstrar ikki umborð, tí skipanin har er ein onnur enn her heima. Soleiðis hevur hesin dekkarin heldur ikki sagt seg úr starvi við Carlton.

Tá ið Carlton varð raktur av mynstringarbanninum fyri limir í Føroya Fiskimannafelag, skuldu fýra av fimm dekkarum við aftur. Hin fimti dekkarin eins og kokkurin skuldu í land at halda frí.

Hesir seks av manningini á Carlton vita í dag ikki, hvør endin verður av hesum stríðnum, nú einki røkist fyri, at reiðarin og felagið, har teir eru limir, ikki kunnu semjast um eina loysn, sum allir partar kunnu góðtaka.

- Onkur er eisini biðin við føroyskum ísfiskaskipi, men tá ið neyðugt er at mynstra, hevur Føroya Fiskimanafelag rátt viðkomandi frá at taka henda kjansir. Um tú mynstrar við øðrum skipi, kann tað samstundis tulkast sum um, at tú hevur sagt teg úr starvi.

Og tað er ikki hetta, sum dekkarar og kokkur vilja.

- Vit vóna, at reiðarin sær tað neyðuga í, at sáttmálin verður hildin, og í løtuni hava vit ongan sum helst hug til at slaka.

Dekkararnir siga seg onga løtu ivast í, at tað eru menn umborð á Carlton, sum taka teirra arbeiði upp, nú mynstringarbannið er galdandi.

- Vit eru vanliga 4 dekkarar við skipinum, og vanliga hjálpa 1. og 2. stýrimaður og maskinmaðurin, sum hevur vakt, til, tá ið mest er at gera. Nú eingin dekkari er við Carlton, er greitt, at onkur annar tekur arbeiði hjá okkum, siga dekkararnir.